## Føroysk húsarhald mist 4 milliardir í frívirði



Frívirðið hjá føroysku húsarhaldunum er minkað útvið 4 milliardir krónuir síðan heystið 2007. Tað sæst í hagtølunum á seinastu búskaparmetingini hjá Landsbanka Føroya. Frá mars mánaði 2005 til september í 2007 vaks samlaða bústaðarvirðið í Føroyum úr knøppum 15 milliardum krónum, upp í næstan 25 milliardir krónur. Samstundis vaks frívirðið á føroysku sethúsunum eisini, tá útlánini til sethús ikki vuksu nevnivert sama tíðarskeið. Í september 2007 var samlaða frívirðið í føroyskum sethúsum góðar 19 milliardir krónur, meðan tað í mai 2009 var góðar 15 milliardir krónur. Bústaðarvirðið er ikki minkað eins nógv, knappar 3 milliardir krónur, meðan útlánini til sethús er vaksið við einari milliard.

## Virðið á partabrøvum hjá føroyingum minkað 68 prosent

Samlaða virðið á partabrøvum, sum føroyingar eiga, er fallið við heilum 68 prosentum síðan oktober 2007. Tað vísa nýggjastu tølini frá Landsbanka Føroya. Í oktober mánaði 2007 áttu føroyingar partabrøv fyri 7.543 milliónir krónur, ella 7,5 milliard. Men síðani fíggjarkreppan brast á, er virðið á partabrøvum kring allan heim fallið stútt. Hetta hevur sjálvsagt eisini ávirkað teir føroyingar, sum eiga partabrøv, og í juli mánaði 2009 varð samlaða virðið á partabrøvum, sum føroyingar eiga, komið niður á 2.276 milliónir krónur, svarandi til eina minking á 68 prosent tilsamans.

# Kendis eg aftur

**Ein teirra, ið hevur róð út frá júst Bakkafjørðinum, er Kaj í Bartalsstovu, og hann kennir seg aftur**

ÍSLAND
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

- Ja, her baldist man í 1944 við einum áttamannafari, vit vóru fimm mans, sigur Kaj í Bartalsstovu.

Men gøtumeninir vóru kortini ikki teir einastu, sum róðu út frá Bakkafirði hetta árið.

- Vit vóru einir 50 mans. Teir vóru ymsastaðni frá úr landinum. Úr Skopun, úr Miðvági, Sandavági, úr Fuglafirði og onkur var eisini úr Suðri, sigur Kaj í Bartalsstovu.

Hendan dagin á Bakkafjørðinum var veðrið av tí allarbesta, og sambært gøtumanninum var tað yvirhøvur gott, tá teir fiskaðu har í 1944.

- Fyri tað mesta var veðrið gott. Men var hann vestan eftir og lá út av landinum, kundi tað verða nokk so nógvur vindur. Hann kom innan úr landinum, og hann var glóðheitur, sigur Kaj í Bartalsstovu.

Hann letur eisini væl at fiskiskapinum hetta árið.

- Vit fiskaðu væl, tað var nógvur fiskur til. Vit landaðu sum regul til skip, sum lógu har og keyptu fisk, men var einki skip, so flaktu vit fiskin. Tað var toskur, vit fiskaðu, sigur Kaj í Bartalsstovu.

### Vitja fyrr

Teir vóru ikki væl útgjørdir at flekja, so tað gekk alt fyri seg á sandinum, og síðani var fiskurin borin upp á bakkan og saltaður.

Teir royndu bæði við snøri og línu.

- Ja, vit nýttu báðar veiðihættir, men seinni mest við línu, sigur Kaj í Bartalsstovu.

Teir vóru so í Íslandi alt summarið. Vanliga varð farið í mai, og komið aftur í september.

Hetta var tó ikki fyrsta ferðin, at Kaj vitjaði aftur á Bakkafjørðinum.

- Nei, eg var her eisini fyri trimum árum síðani. Tá koyrdu vit runt alt Ísland. Tá komu vit av Seyðisfjørðinum um Egilsstaðir og her til Bakkafjørðin. Ein gamal kenningur búði her, og konuna kendi eg eisini, so har vóru vit inni og drukku kaffi, sigur Kaj í Bartalsstovu.

Tann maðurin var kortini farin herfrá, nú Kaj aftur vitjaði á Bakkafjørðinum.

### Frálíkur túrur

Eins og øll onnur, sum vóru við á túrinum, letur Kaj í Bartalsstovu sera væl at.

- Hetta hevur veirð ein ógvuliga væl eydnaður túrur, veðrið er gott, og tað ger bara alt betri. Tað er eisini stuttligt at fríska gomul minnir upp, sigur Kaj í Bartalsstovu.

Nakað er sjálvandi broytt frá minnunum frá 1944.

- Her eru komin fleiri hús aftrat, men nógv av teimum gomlu húsunum eru burtur, millum annað húsið, har vit búðu, sigur Kaj í Bartalsstovu.

Men Bakkafjørðurin ber eisini døpur minni við sær fyri gøtumannin.

- Abbi mín druknaði her á Bakkafirði. Tað var í 1904, og hann var bara 24 ára gamal, tá teir kollsigldu við einum báti á Bakkafirði, sigur Kaj í Bartalsstovu.

Men túrurin var frálíkur, heldur hann, og tað var fyri hann stuttligt at vitja aftur á slóðir føroyinga í Íslandi.



*Kaj í Bartalsstovu avmyndaður á Bakkafjørðinum, tá hann saman við útvið hundrað øðrum vitjaði aftur á slóðir føroyinga í Íslandi*
*Mynd: Leo Poulsen*

# Handverkslærlingar skulu ikki niður í løn

**Føroya Handverkarafelag mótmælir ætlaðu lógarbroytingini hjá Mentamálaráðnum at lække lærlingalønina**

*Tíðindaskriv*

Føroya Handverkarafelag mælir Mentamálaráðnum til at taka aftur ætlaðu lógarbroytingina í lógini um yrkisútbúgvingar.

Mentamálaráðið hevur sent Løgtinginum eitt broytingaruppskot, har lagt verður upp til at handverkslærlingar í skúlatíðini skulu fáa vanligan lestrarstuðul heldur enn lærlingaløn, sum higartil.

Orsøkin til uppskotið er at spara landskassanum pengar, tí landskassin í núverandi skipan endurrindar læruplássunum 75% av lønarútreiðslunum í skúlatíðini.

Føroya Handverkarafelag hevur roknað út, hvat lærlingarnir koma at missa við hesi ætlaðu lógarbroytingini. Umroknað til mánaðarløn, verður missurin 3.649 krónur um mánaðin tað fyrsta læruárið vaksandi upp í 8.959 krónur um mánaðin tað fjórða læruárið.

- Føroya Handverkarafelag kann ikki viðmæla einum uppskoti, sum beinleiðis tekur burturav inntøkuni hjá lærlingunum. Um landskassin vil spara, so mæla vit heldur til at lække afturberingina til læruplássini. Vit kunnu heldur ikki góðtaka, at politiska skipanin fer inn á eitt øki, ið er regulerað sambært einum sáttmála millum Handverkarafelagið og Vinnuhúsið sum umboð fyri meistararnar, sigur Henry Olsen, formaður í Føroya Handverkarafelag.

Føroya Handverkarafelag ber ótta fyri, at áhugin fyri at gerast handverkaralærlingur fer at minka um hetta uppskotið vinnur frama.

- Tað er neyðugt at eggja ungfólki til at taka handaligar útbúgvingar, tí vit bera ótta fyri, at tað í framtíðini verður trot á fólki við handverkaraútbúgving, um ein so eyðsýnd "gularót" sum lærlingaløn í skúlatíðini verður tikin burtur, sigur Føroya Handverkarafelag millum annað í sínum hoyringssvari til Mentamálaráðið.